## FCK skiftir liðformann

Hjalte Bo Nørregaard er nýggjur liðformaður hjá FCK. Hetta gjørdist greitt eftir venjingina í gjár, har venjarin Ståle Solbakken tosaði við teir báðar. Sambært honum kemur Ulrik Laursen ikki at spæla allar dystirnar í miðverjuni í ár, samstundis sum hann væntar, at Hjalte Bo Nørregaard verður styrktur sum leikari, tá hann verður liðformaður. Ståle Solbakken undirstrikar eisini, at liðformansskiftið er farið fram í besta forstáilsi.




## Arnold Berg aftur á Skála

Í junimánaði eru 13 leikaraflytingar farnar fram. Millum annað hevur Arnold Berg flutt sítt leikaraloyvi aftur til Skála frá ÍF Føroyum. Hetta merkir, at hann eftir øllum at døma fer at hjálpa bygdarmonnum sínum í summarfrítíðini. Tað sama ger Ovi Brim, sum eisini hevur flutt sítt leikaraloyvi heim til B68 frá ÍF Føroyum. Átta mans hava flutt síni leikaraloyvi í juni, meðan fimm kvinnur hava gjørt tað sama. Mest áhugaverda skifti her er, at Heidi á Lakjuni skiftir frá B36 til B68.

# Doris slapp at práta við sítt idol




Doris Griessner, sum er úr Eysturríki, varð púrasta paff, tá hon umvegis oyggjaleikastudio hjá Rás2 slapp at tosa við føroysku hetjuna frá Landskrona

Mynd: Álvur Haraldsen

## Eingi heiðursmerki í borðtennis

**Borðtennisspælararnir megnaðu ikki at spæla seg fram í hálvfinalurnar í einmansleikinum**

Í gjár var einstaklingakapping í borðtennis á skránni á Oyggjaleikum, og fleiri føroyskir borðtennisspælarar royndu seg í kappingini.

Fleiri spælarar megnaðu at spæla seg víðari frá innleiðandi umførunum, men eingin av spælarunum vann heilt fram í hálvfinalurnar.

Tann føroyski spælarin, sum kom longst í kappingini, var Ragnar Egilsson, sum kom í fjórðingsfinaluna, men tann dystin tapti Ragnar.

Rói Agnarsson varð útsligin í 1/16 finaluni.

Marin í Dali og Rakul Mikkjalsdóttir taptu eisini sínar 1/16 finalur.

Í dag hevur verið spælt í blandaðum tvímansleikir.

eyðun

**Doris Griessner úr Eysturríki er eitt av mongu sjálvbodnu hjálparfólkunum á oyggjaleikunum á Álandi. Mikudagin slapp hon at tosa við sítt stóra idol, Jens Martin Knudsen**




Heri Simonsen

Nærum 1.300 sjálvboðin fólk hjálpa til á oyggjaleikunum. Talan er ikki bara um fólk frá Álandi, men eisini um hjálparfólk, sum koma úr øðrum londum. Doris Griessner er komin úr Eysturríki, fyri at hjálpa til á oyggjaleikunum. Unga og fryntliga eysturríkska kvinnan lesur samfelagsfrøði, og skal skriva høvuðsuppgávu um oyggjasamfeløg. Tá hon hoyrdi um oyggjaleikirnar, var hon ikki í iva um, at hon skuldi melda seg til sum hjálparfólk. Tað fór samstundis at geva henni ein møguleika at møta fólki úr ymiskum oyggjum, og tað kann hon gagnnýta sum vitan til sína høvuðsuppgávu.

### Jens Martin fjeppari

Í fjør heyst var Doris til eina listaframsýning á Leopold Museum í Wien. Talan var um eina serliga føroyska listaframsýning. Ein partur av listaframsýningini var, at dysturin millum Føroyar og Eysturríki í Landskrona á sinni, var sýndur í einum sjónvarpi, har ein kundi velja ímillum at hoyra tað eysturríksku ella tað føroysku frásøgnina. Tiltikna húgvan hjá Jens Martin Knudsen var eisini sýnd fram á listaframsýningini. Doris Griessner er ein stórur Jens Martin Knudsen fjeppari, og hevur eitt brennandi ynski um at sleppa at møta Jens Martini Knudsen. Mikudagin var Doris gestur í studionum hjá Rás2 í Mariehamn.

Hilmar Jan Hansen syrgdi fyri, at Jens Martin Knudsen kom á linjuni, og Doris fekk sítt lívs yvirraskilsi, tá hon slapp at tosa við Jens Martin. Hon var ovurfegin, og fortaldi vítt og breitt um stóru upplivingina hon hevði havt í studionum hjá Rás2. Fjølmiðlamenn úr øðrum oyggjum frætti um tað stuttligu hendingina, og teir høvdu tað sum ein part av sínum oyggjaleikafrásøgnum.

– Tit góvu mær eina ógloymandi uppliving, greiddi ein fegin Doris Griessner frá í beinleiðis sending á Rás2.